## DAGSINS MEINING

# Ófrætti úr Eystri

Tað vóru sonn ófrætti, ið bórust úr fjareystri um áður ókenda umfarsjúku. SARS hevur loypt hvøkk á allan heimin. Hetta er ikki er løgið. Vit eru á okkara døgum ikki von við so herviligar og vandamiklar umfarsjúkur. SARS er ein óhugnalig áminning um, at mannaættin hóast okkara ómetaligu tøkniligu framstig er viðbrekin og at torført er at byrgja fyri øllum hugsandi vandum. SARS er eisini ein læra um, hvussu vandamikið tað afturlatna samfelagið er. Hevði hitt almenna Kina viðurkent vandan frá fyrsta degi og ávarað umheimin, so hevði altjóðasamfelagið kunna tikið neyðturvilig stig at kalla frá fyrsta degi av, og nógv høvdu verið spard. Nú er virðismikil tíð farin til spillis, og umfarssjúka er sloppin at breiða seg ótálmað í alt ov langa tíð.

SARS hevur breitt seg víða, men tykist enn ikki at vera komin til Norðurlond. Kortini hava Norðurlond brynjað seg til at taka ímóti sjúkuni. Danskir heilsumyndugleikar, sum hava verið fyri atfinningum fyri ikki at vera nóg væl tilbúgvnir, hava tikið atfinningarnar at sær. Tilbúgvingin í Danmark er økt munandi eitt nú við 60 seingjaplássum afturat á Hvidovre-hospitali, soleiðis, at tað nú í Danmark eru 30 sjúkkrahúsdeildir við í SARS-tilbúgvingini. Hildið verður tí, at Danmark nú erført fyri at veita borgarunum tær neyðugu heilsutænastur, ið skulu til, um SARS kemur til Danmark.

Men hvussu er so støðan her í Føroyum? Hvussu eru vit fyri, um tann vanlukka skuldi hent, at SARS kom til Føroya? Hvørja tilbúgving hava vit? Hvørji tiltøk hava landsins heilsumyndugleikar sett í verk? Hvussu verður almenningurin kunnaður og hvussu er okkara heilsuverk fyri at takla eina slíka støðu? Hesir spurningar eru varisliga reistir í pressuni, men ikki kann ein siga, at vit hava fingið greið og nøktandi svar. Tað er tí upp á tíðina, at viðkomandi myndugleikar nágreinliga greiða almenninginum frá tilbúgvingini og annars øllum teimum spurningum, ið koma fram í sambandi við SARS. Hetta eigur at verða gjørt á ein sakligan og skilagóðan hátt, sum undirstrikar álvaran uttan at loypa óneyðugan ótta á fólk.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# SMS-blaðið er svarið

### Svar til Hera Mohr, skald

**Sjúrður Skaale**



Á flokstingið Tjóðveldisfloksins, sum var í Hósvík herfyri, segði eg nøkur fá orð, har eg fanst at flokkinum fyri at tosa ov nógv um flákrandi hugtøk, og ov lítið um gerandisdagin hjá fólki.

Men sambært kjakinum farnu dagarnar hava nøkur fólk fingið hesa fatan av tí, eg bar fram:

Eg helt uppá, at fólk, sum lesa SMS-blaðið, eru býtt, meðan tey, sum ikki lesa SMS-blaðið, eru klók.

Men eg segði ikki bara at SMS-blaðið indikerar markið millum tey býttu og tey klóku. Nei, eg vísti eisini á, at hetta blað haraftur-at er landsins mest eftirfarandi politiska kumpassnál: Tey, sum lesa SMS-blaðið (t.e. tey býttu) eru sambandsfólk, og tey, sum ikki lesa SMS-blaðið (t.e. tey klóku) eru sjálvstýrisfólk.

Samanumtikið var tað — sambært orðaskiftinum — hetta, eg í høvuðsheitum hevði at siga flokstinginum:

Sig mær, um tú lesur SMS-blaðið, og eg skal siga tær, hvussu vitugur tú ert!

Sig mær, um tú lesur SMS-blaðið, og eg skal siga tær, hvønn tú velur!

Sig mær, um tú lesur SMS-blaðið, og eg skal siga tær, hvør tú ert!

**Romanin hjá Hera**

Heri Mohr, sum farnu tíðina hevur víst óført hegni og høgt flog sum sosialrealistiskur forfattari, tekur í Dimmalætting mikudagin málið upp. Í sínum seinasta hugfangandi skaldsøgubroti letur Heri ein av sínum sjáldsama livandi romanfigurum — Pætur — lýsa Sjúrð Skaale og hansara hugburð soleiðis:

*"Pætur stardi við sínum droymandi eygum, og við høgra peikifingri á nøsini segði hann lágmælt: rasisma! Hetta kvøldið var hann annars í tí rætta prátingarlagnum. - Hann hevði kanska eina lítla kenning".*

Nú veit eg ikki um skaldið sjálvt — Heri Mohr — hevur havt kenning, tá hann skrivaði. Men ógvuliga kensluborin hevur hann ið hvussu er verið. Og tað er eingin ódygd. Tað er gott, at Heri harmast um óræ ttin. Tað er fyrimyndarligt, at hann nýtir sínar stóru skaldagávur til at berjast ímóti tí ónda.

Men sum sosialrealistiskur høvundur átti hann kanska at kannað eitt lítið sindur eftir um tað, hann skrivar, er rætt. Skalt tú kalla fólk rasistar, mást tú jú helst standa á tryggari grund.

Og kanska var tað, sum Sjúrður Skaale segði um SMS-blaðið og tess lesarar, ikki so ræðuligt, sum Heri ger tað til. Kanska var alt hetta bara ein fjøður, sum bleiv til fimm hønur. Ja, kanska nevndi Sjúrður bara SMS-blaðið eina einastu ferð — í skemti.

Heri kundi jú spurt onkran, áðrenn hann gjørdi ta niðurstøðu, at Sjúrður Skaale er rasistur. Har vóru jú eini 100 fólk til staðar henda vakra dagin í Hósvík.

Annars vil eg ynskja Hera Mohr alt tað besta, og góða eydnu við forfattaraskapinum.

# Heldur páskafrí enn skúlaloysn

**Jógvan Arge**
*Løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin*



Sambandsuppskotið um at veðhalda fyri 87 milliónum krónum til Tekniska skúla og Handilsskúlan í Havn hevur verið á dagsskránni hjá løgtingsins mentanarnevnd tvær ferðir, síðani tað varð lagt fram á ting.

Høvuðsorsøkin til, at tað ikki kom fyri aftur fyri páskir var, at fyrst plantaði løgtingsformaðurin ein tingfund mitt í fundartíðina hjá mentamálanevndini týsdagin 8. apríl, og síðani fór sambandsmaðurin í nevndini, Heðin Mortensen, av landinum í páskafrí, so vit ikki fingu hildið fund týsdagin 15. apríl.

Trý mál vórðu beind mentanarnevndini eftir seinasta framløgudag. Málið um Tjóðpall Føroya, málið um skúlatilboð til brekað og hetta málið um fígging av bygging hjá Tekniska skúla og Handilsskúlanum.

Mentanarnevndin hevur fastan fundardag týsdag klokkan 10. Ongin fundur var 11. mars, tí tingmenn vóru upptiknir av grundlógarráðstevnu.

Týsdagin 18. mars vóru øll málini á skránni. Tá varð avrátt at kalla fólk inn til samrøður um tey bæði fyrru málini, meðan støða skuldi takast í tí triðja málinum seinni.

25. mars høvdu vit fólk inni um Tjóðpallin. Allur fundurin fór við tí.

2. apríl høvdu vit fólk inni um skúlatilboðið til brekað. Allur fundurin fór við tí.

9. apríl var fundur avtalaður við øllum trimum málunum á skránni.

Vit møttu klokkan 09.00 og avgreiddu álitini í teimum báðum fyrru málunum, men fingu ikki stundir at fara undir skúlamálið, tí løgtingsformaðurin hevði plantað ein løgtingsfund í fundartíðina hjá mentanarnevndini týsdag klokkan 10.00.

Ætlanin var síðani hava fund um skúlamálið týsdagin 16. apríl, tí vanligt er at hava nevndarfundir í dimbuldagavikuni, men tá bar ikki Heðini Mortensen til at møta, tí hann skuldi av landinum í páskafrí.

Hann fekk at vita, at so bar ikki til at hava fund fyrrenn týsdagin 3. páskadag. Og málið stendur á skránni til tann fundin.

Kortini hevur Heðin Mortensen kravt málið fyri løgtingið aftur uttan álit frá nevndini.

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Fiskiflotin og koldioxidútlát

**A. Guttormur Djurhuus**



Í frágreiðing frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni um útllát av veðurlagsgassum, verður sagt, at útlátið frá fiskiskipum er 32 prosent av samlaða útlátinum í Føroyum. Hetta tal er helst á góðari leið , hóast restin av frágreiðingini er lítið eftirfarandi. Fiskiskip eru sostatt tann bólkur, sum letur nógv tað mesta koldioxidið út í lufthavið. Næststørsti bólkurin eru húsarhaldini við 20 prosentum.

Í 1978 skipaðu Ídnaðarfelagið og Ídnaðarstovan í felag fyri eini orkuráðstevnu í Havn. Har vórðu hildnir fyrilestrar av allahanda slag, men serliga varð røtt um hvussu minkast kundi um oljunýtsluna. Til dømis helt Trygvi Árting, sum gjørdist áttati herfyri, til lukku við tí, fyrilestur um veiðu og orku, og hevði hann funnið fram til fiskinøgd fyri litturin av olju fyri ymsar skipabólkar. Ein sera áhugaverdur og tankavekjandi fyrilestur, sum í dag er eins aktuellur og tá. Sjálvandi eiga tølini at verða dagførd, men eg ivist í, um tey eru so nógv broytt.

<u>Tølini hjá Trygva vóru fyri 1976 — 77, og kom hann fram til niðanfyristandandi úrslit:</u>

| | |
| --- | --- |
| Rækjuskip, litrar av olju fyri hvørt kilo av pilkaðum rækjum | 3,60 |
| Saltfiskatrolarar, litrar av olju fyri hvørt kilo av avhøvdaðum, sløgdum fiski | 0,55 |
| Stórir ísfiskatrolarar | 0,68 |
| Smáir ísfiskatrolarar | 0,76 |
| Trolbátar yvir 40 tons | 0,32 |
| Trolbátar 25 — 40 tons | 0,26 |
| Trolbátar undir 25 tons | 0,19 |
| Stállínuskip til ísfisk | 0,28 |
| Bátar við línu 40 — 60 tons | 0,26 |
| Bátar við línu 25 — 40 tons | 0,15 |
| Bátar við línu undir 25 tons | 0,14 |

Hesi tøl vóru trupul at fáa til vega, Hagstovan lá mestsum í andaleypi, eru helst rímiliga røtt, men eiga sum sagt sjálvandi at verða dagførd. Bert spell at tøl fyri snelluveiðu ikki eru við. Einki er at ivast í, at litrar av olju fyri kilo av snelluveiddum fiski hevði verið eitt sera lágt tal.

Við eini umstrukturering av fiskiflotanum skuldu tað verið góðir møguleikar at lækka oljunýtsluna og sostatt um útlátið av koldioxidi.

Tað man vera mestsum semja um, at fiskiflotin er 25 — 50 prosent ov stórur til teir fiskimøguleikar, vit hava. Við at minka um veiðuorkuna fær eftirverandi veiðiorkan betri veiðumøguleikar og harav betri úrslit. Tað merkir við somu orku eitt betri úrslit. Úrslitið við einum meira hóskiligum flota til teir møguleikar, vit hava, hevði sostatt givið bæði skipi og manning betri fíggjaligt úrslit og landinum betri búskap. Og fyri einki fingu vit minkað um útlatið av koldioxidi, tí at oljunýtslan hevði minkað.

Við einum samspæli millum politiska myndugleikan og vinnulívið skuldi tað latið seg gjørt at, í ávísan mun um ikki annað, uttan stórvegis háva at minkað um oljunýtsluna og harvið útlat av vakstrarhúsgassi. Tí áhugamálini hjá tí almenna og vinnuni falla her saman til gagns fyri umhvørvið.

P. S.
Fyrilesturin hjá Trygva Árting er at finna í bókini Orka, Orkuráðstevnan 78, sum Ídnaðarfelagið og Ídnaðarstovan góvu út í 1979.

# Viðmerking til greinina: » Bomb Tel Aviv! «

**Símun A. Klein**
*Tårs*

Jeg er helt enig med dig i, at Bush læser SIN bibel, - men Bush har næppe indtil dags dato læst Guds Bibel, og heri ligger der en himmelvid forskel.

Jeg har førhen nævnt de forskrifter, der fremdeles er gældende i dag i henhold til de hellige, bibelske skrifter (ikke Bush's hellige skrifter) - der er trods alt kæmpestor forskel på disse to bibler, tro mig, jeg ved dette med sikkerhed!

Endnu engang ønsker jeg at fremhæve dette faktum, som bibelen lærer os, og det er så dette: » Et testamente, som forud er gjort retsgyldigt af GUD, kan loven, som blev til 430 år senere, ikke gøre ugyldigt, så den skulle sætte Guds løfte(forjættelsen) ud af kraft! - ( Nu ved jeg så ikke, fra hvilket årstal eller dato Paulus regner ud fra her, men jeg mener, at vi roligt kan tillægge ca. 2000 år til disse førnævnte 430 år). - Fordi, fås arven ved lov, da fås den ikke mere ved Guds løfte(forjættelse); Men til Abraham har Gud skænket den/det ved forjættelse (Guds løfte)! Og ellers til alle troende, der er født efter Abrahams tilblivelse. - Og Abraham kom altså fra det område, som vi i dag kender som Irak! ( Galaterne 3 : 15 - 18 ). ( 1. Mós. 11 : 31 ).

Hvad vil jeg så sige med dette??? - Jo, før Moses modtog stentavlerne med de ti bud samt tilhørende love, så havde Gud oprettet et/en testamente/pagt med Abraham. Og igen længe før Abraham havde GUD yderligere oprettet et/en testamente/pagt med Noa efter syndfloden, hvis ordlyd er denne:

» Men for jeres eget blod kræver jeg hævn; af ethvert dyr kræver jeg hævn for det, og af menneskene indbyrdes kræver jeg hævn for menneskenes liv. - Om nogen udøser menneskers blod, ved mennesker skal hans blod udøses, fordi i sit billede gjorde GUD menneskene! « ( 1. Mos. 9 : 5 - 6 ). - Hermed burde der ikke være nogen tvivl om, hvilken bibel BUSH læser: » Hans egen eller GUDS bibel! «

Derfor mener jeg blot, at I som mener eller tror jer at være kristne troende, I burde hellere læse Guds bibel istedet for at læse BUSH'S bibel. Heri er der altså himmelvid forskel på disse to bibler, men når nu såkaldte kristne ikke kan se forskel på sandhed og ikke sandhed, hvordan skal så de nødstedte finde den frelse, som bibelen snakker om???

I det nye testamente stadfæster Jesus Testamentet /Pagten, som GUD gjorde med Noa i sin tid. Dengang ypperstepræstene og folkets ældste udsendte sine medarbejdere eller undersåtter - for den sags skyld - til at gribe Jesus som en urostifter m.m., så gav Peter tilkende sin forkerte side af nationalismen ( ellers er nationalisme aldeles ikke noget forkert overhovedet, kun når Peter og BUSH misforstår evangeliet, at så er slig nationalisme dundrende forkert, men ellers ikke!). - Men Peter, der blandt andre var sammen med Jesus, greb efter sit sværd, drog det og slog efter ypperstepræstens tjener og huggede øret af ham. Da siger Jesus til Peter: » Stik dit sværd i skeden igen; fordi alle (uden undtagelse, Bush, Peter eller Saddam eller hvem det nu end er), som griber til sværd, skal falde for sværd! « ( Matt. 26 : 47 - 56 ).

Så ligger spørgsmålet blot og venter på et svar, hvorvidt treenigheden indenfor tingets dørtærskel har tilsidesat evangeliets gyldighed i vores dage, eller om nu nådetiden er omme, fordi var nådetiden nu omme, så skulle vi i dag høre om massefrelse samt evangeliet forkyndt med kraft i Israel i dag, men dette tilfælde er jeg så ikke vidne til i skrivende stund. Derfor har vores egne munde travlt med at vidne, at vi er kristne, men samtidig godtager vi aldeles ikke de reelle såkaldte Guds hellige skrifter, - hvorfor mon dog hr. Jørn Nielsen?

Jeg vil afslutte med Åbenbaringens bog, hvori Helligånden åbenbarer for Johannes apostel, at Guds pagt med Noa og som Jesus også forsvarede i sin læretid, igen bliver ophøjet på sin rigtige plads og som værende et ufravigeligt løfte fra GUD, helt til ende bliver på tiden, ja, er af evig gyldighedsværdi:

» Hvis nogen har øre, han høre! - Hvis nogen vil bringe andre i fangenskab, han kommer selv i fangenskab; hvis nogen dræber med sværd (bomber eller klyngebomber m.m.), han skal selv dræbes med sværd (med samme fremgangsmåde). - Her gælder det for de hellige om udholdenhed og tro! « ( Åbenb. 13 : 9 - 10 ).

Derfor siger jeg til jer såkaldte hellige: » slut nu med at føre djævelens sag her på jorden, men istedet bevæbn jer med det sande, tveæggede sværd som er i stand til at trænge så dybt ind, at det sønderdeler sjæl og ånd, marv og ben og er dommer over hjertets tanker og meninger, fordi ingen skabning er usynlig for Ham; alt ligger blottet og udbredt for Hans øjne; - Og Ham skal vi stå til regnskab, også når vi holder med dem, der strider bevidst imod Guds bud! « ( Hebr. 4 : 12 - 13 ).

Derfor, så er tiden inde nu, hvor kristne troende tilbeder Kristus, men slutter med at tilbede falske ledere, såsom Bush m.m.!

*Framhald av síðu 10*

Undir 1. viðgerð vístu seg at vera fleiri meiningar í tinginum. Tjóðveldisflokkurin førdi fram, at bæði tekniska skúla, handilsskúlanum og øðrum skúlum tørva betur umstøður, men flokkurin tók ikki undir við at fíggja skúlabygging á tann hátt, sum sambandsflokkurin skýtur upp.

Tjóðveldisflokkurin helt uppá, at skúlarnir mugu raðfestast inni í tí almenna íløgukarminum, sum seinastu árini hevur verið nógv merktur av samferðsluíløgum, men komandi árini ætlandi skal verða meira merktur av íløgum í eitt nú skúlar.

Frammi hevur eisini verið, at tað er órímiligt mótvegis øðrum skúlum, eitt nú Studentaskúlanum í Hoydølum, sum ikki hevur sæð eina bøtandi hond í 40 ár, at taka ein part av tí ætlaða skúladeplinum í Marknagil fram um ein annan.